# Bíða eftir sjónvarpspengum

Bestu donsku fótbóltsfeløgini gleddu seg um eina veruliga kapitalinnsprænıng, tá nýggj avtala um sjónvarpsrættindi varð gjørd í fjør. Tað er tó komið óvart á fleiri feløg, at útgjaldið av pengunum ikki kemur fyrr enn í desember mánaði. Jyllands Posten skrivar, at fleiri av feløgunum hava roknað hetta sum gjaldføri við ársbyrjan, og tað gevur trupulleikar við gjaldførinum í fleiri feløgum. Stjórin í Divisionsforeningen, Claus Thomsen, dugir tó ikki at síggja trupulleikan í hesum. Hann tvíheldur nevnliga um, at feløgini alla tíðina hava vitað, hvussu útgjaldið av pengunum skuldi fara fram.




# Laursen var bestur

Martin Laursen varð leygarkvøldið kosin sum ársins danski fótbóltsspælari í 2008. Hetta tá DR skipaði fyri stórum ítróttargalla. – Hetta er heilt fantastiskt. Ikki minst, tá eg hugsi um, hvussu stórar trupulleikar eg havi havt við knænum, segði Martin Laursen. Samstundis nýtti hann høvið at takka skurðlæknanum, Richard Stedman, sum opereraði knæið á verjuspælaranum fyri hálvum triðja ári síðani. Tað eru limirnir í danska spælarafelagnum, sum greiða atkvøðu, og vann Martin Laursen framman fyri Nicklas Bendtner, Daniel Jensen, Christian Poulsen og Jonas Borring.

StÍF-Neistin 28-26 (16-11):

# StÍF spælir framvegis við

**Strandingar vunnu á Neistanum, og so er finaluplássið brádliga bara tvey stig burtur**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Strandingar hava nú aftur blandað seg upp í oddastríðið. Eftir sigurin á Neistanum eru teir bert tvey stig frá einum finaluplássi*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

StÍF tók av, tá teir sunnudagin fóru undir uppgávuna, sum líktist einum seinasta møguleika at halda fast í royndini at røkka einum finaluplássi í FM-kappingini í manshondbólti.

Sigurin á Neistanum varð grundlagdur í fyrra hálvleiki, tá StÍF var so nógv tað sterkara liðið. Neistin hevur havt ilt við at fáa samanhang í spælið seinastu dystirnar, og hetta revsaði heimaliðið so ruddiliga.

Eftir steðgin kom Neistin betur við, men hóast teir eitt skifti móti endanum vunnu seg upp á javnt, so megnaðu teir ikki at halda dampinum uppi seinastu løtuna.

Sigurin ber við sær, at StÍF nú er komið upp á 12 stig. Tað eru tvey færri, enn Neistin hevur á øðrum plássi, og so mundi tað eisini koma væl við, at H71 einki fekk við sær úr Vestmanna.

## FAKTA um dystin

**StÍF-Neistin 28-26 (16-11):**
**10 min:** 6-5
**20 min:** 11-7
**40 min:** 20-15
**50 min:** 23-22
**Málskjúttar**
**StÍF:** Alexander Johansen 6 (1), Bárður Danielsen 4, Mortan Hansen 4, Borgar Danielsen 4, Jørmund Joensen 3, Bent Djurhuus 2, Hávardur Trúgvason 2, Pauli G. Hansen 2, André Danielsen 1
**Neistin:** Áki Mørk 5, Tróndur Kragesteen 5, David Edvardsen 4, Jugoslav Djumic 4, Blagoje Buha 3(1), Birgir Poulsen 2, Finnur Hansson 2, Karl Herup Olsen 1
**Brotskøst:** StÍF 2, Neistin 2
**Útvísingar:** StÍF 1, Neistin 1
**Dómarar:** Ragnar Simonsen & Rúni Mohr

Kyndil-KÍF 28-24 (12-10):

# Kyndil tekur seg fram



*Kyndil, sum stóran part av árinum hevur verið botnlið, hevur veruliga lyft seg seinastu vikurnar*
*Mynd: Sofus Debes Johannesen*

## FAKTA um dystin

**Kyndil-KÍF 28-24 (12-10)**
**10 min:** 3-3
**20 min:** 8-7
**40 min:** 17-11
**50 min:** 22-18
**Málskjúttar**
**Kyndil:** Bárður Johannesen 6(1), Høgni Klein 5, Tummas Pauli Hanusarson 5, Janus Einar Sørensen 4(1), Jónleif Sólsker 3, Hans Áki Dal-Christiansen 2(1), Andreas Sólsker 1, Rói Lamhauge 1, Rani Ellingsgaard 1
**KÍF:** Rógvi Weihe 6, Jákup Trúgvason 4, Ási Dam 4(2), Niklas Reginsson 3, Teitur Joensen 3, Andrias Nielsen 2, Hallur Hansen 2
**Brotskøst:** Kyndil 5, KÍF 2
**Útvísingar:** KÍF 2
**Dómarar:** Andreas F. Hansen & Eyðun Samuelsen

Mansliðið hjá Kyndli hevur havt tað sera striltið í vetur, men seinastu vikurnar hevur tó glógvað hjá teimum grønu. Og í gjár vunnu teir triðja sigurin upp í slag, tá KÍF vitjaði.

Fyri steðgin var talan um ein sera javnan dyst, men fyrstu løtuna av seinna hálvleiki skrykti Kyndil seg leyst, tá teir lupu upp á 17-11.

Og eftir hetta megnaði KÍF als ikki at skapa spenning íaftur. Kyndil helt rimmar fast um munin allan vegin á mál, og hava teir nú vunnið seg upp á átta stig. Tað er framvegis nakað minni enn tað, sum ovaru liðini í deildini hava, men við níggju dystum eftir kann Kyndil væl koma at arga hesi enn meira, enn teir longu hava gjørt.

**-mørk**

